Borgarstórin eftir offshorevitjan: Eitt týðandi fet víðari

Jan Müller

06.12.2015 - 14:46

Oljan.fo

Hóast døpru útlitini í frálandsvinnuni, so megnaði Vágs Havn kortini at fáa ágóða av bíðitíðini eftir nýggjum arbeiðsuppgávum hjá norskum frálandsskipum. Eitt av heimsins størstu og mest framkomnu seismikkskipum, Polar Empress valdi nevniliga at brúka hesa syðstu havnina í Suðuroynni í nærum ein mánað, meðan bíðað varð eftir nýggjari uppgávu. Nú er skipið so til arbeiðis í Miðjarahavinum.

Vit spurdu borgarstjóran, Dennis Holm, hvussu henda fyrsta royndin at fáa útlendsk frálandsskip at brúka Vágs Havn, riggaði:

“Haldi alt gekk sera væl - teir lótu væl at, tá teir loystu, og okkara fatan er eisini, at teir vóru væl nøgdir við at liggja við Vágs Havn og við tær tænastur teir fingu her.

Fyri okkum var hetta eitt týðandi fet á leiðini at fáa reiðarí at brúka Vágs Havn - og eisini at geara okkum lokalt til at veita neyðugar tænastur. Vit meta eisini, at hetta er góð tilvísing at hava, tá vit samráðast við onnur reiðarí. Vit kunnu eisini bara staðfesta, at áhugin fyri Vágs Havn er vaksin seinastu mánaðirnar, uttan iva eisini orsaka av, at Polar Empress og Sanco Sky valdu at fara á Vág. Og vóna vit nú, at tað fer at bera til at fáa onnur skip at koma hendan vegin. Vit eru í øllum førum til reiðar at taka ímóti teimum.”

Vit spurdu borgarstjóran, hvussu hilnaðist í illveðrinum:

“Í illveðri er tað altíð upp til skiparan at avgera, hvussu hann velur at tryggja skipið. Og hetta var frá 1. degi gjørt í góðum samráð við myndugleikarnir á Vágs Havn. Skiparin valdi tó at fara út á fjørðin at liggja, tá illveðrið leikaði í. Onnur skip vóru liggjandi við kei. Hetta vil altíð verða ein metingarspurningur hjá tí einstaka skiparanum.